


# Norðurlendsk skótaráðstevna um framtíðina

**Føroyar hava í løtuni formansskapin í norðurlendska skótasamstarvinum, og í hesi vikuni verður ein stór norðurlendsk skótaráðstevna í Føroyum. Ráðstevnan skal m.a. umrøða spurningin, hvussu skótarørslan kann halda fram sum ein virkin samfelagsávirkari næstu hundrað árini**

SKÓTALÍV
*Snorri Brend*

Norðurlendska skótaráðstevnan byrjar hósdagin 25. mai – Kristi himmalsferðardag og heldur fram vikuna út. Fleiri enn 100 skótar vera á ráðstevnuni, sum verður hildin á Hotel Føroyum og í Norðurlandahúsinum.

Skótarnir eru úr Grønlandi, Íslandi, Danmørk, Noregi, Svøríki, Finnlandi og Føroyum. Harumframt eru umboð fyri evropanevndirnar og evropaskrivstovurnar hjá skótunum við á ráðstevnuni.

Føroyar hava síðani 1992 verið fullgyldugir limir í norðurlendska skótasamstarvinum.

Á ráðstevnuni verða fleiri verkstovur. Viðgjørt verður m.a., hvussu limatalið kann vaksa og hvussu limirnir kunnu verða røktir, hvussu rúm kann vera fyri øllum í skótaarbeiðinum, og hvussu skótarørslan kann halda fram sum ein virkin samfelagsávirkari næstu hundrað árini.

Endamálið við norðurlendska skótasamstarvinum er at geva møguleikar fyri samstarvi, og at skótaliðini í ymsu londunum kunnu læra av royndunum hvør hjá øðrum og at skilja norðurlendsku mentanina.


*Føroyingar eiga oddasessin í norðurlendska skótasamstarvinum. Nú skal tosast saman um, hvussu skótaarbeiðið kann mennast í framtíðini*
*(savnsmynd)*

# Betri pláss til bátaeigarar

**Tað er ikki bert bíðilisti eftir grundøkjum í Havn. Eisini smábátaeigarar í hópatali ynskja sær pláss við bátabrúgvarnar í Havn. Hetta verður í framtíðini gjørligt í nýggjari smábátahavn í Álakeri**

BÁTAR
*Snorri Brend*

**Álaker, Havn:** Trupulleikin er bert tann, at kommunan ikki hevur havt pláss til allar bátarnar í kommununi. Í dag liggur kommunan inni við eini 200 umsóknum um slík loyvi, harav tær elstu eru frá 1993.

Sagt verður, at fleiri umsøkjarar helst hava aftrað seg at søkt um bátapláss, tí útlitini fyri at fáa eitt slíkt hava verið so vánalig.

Nú skal hinvegin broyting koma í. Ætlanin er nevniliga at geva pláss fyri minst 120 smábátum í Álakeri, nærhendis neystinum hjá Havnar Kappróðrarfelagi.

Áðrenn hetta kann gerast veruleiki er neyðugt at gera eitt grótkast, tí annars er vandi fyri rættiligum brimi í hesi víkini. Fyrst verður tó ein modellroynd gjørd um avleiðingarnar av einum slíkum grótkasti.

Á fundi hóskvøldið samtykti býráðið at játta 1 mió kr. til hesar modellroyndir. Eftir tað verður arbeitt víðari við hesi ætlanini, sum mangir bátaeigarar hava bíðað leingi eftir.


*Børn og vaksin í hópatali lurtaðu eftir Trøllommuni, sum eisini dugir at spæla violin*

# Føðingardagur í vetrarveðri

**Hvørki regn ella vindur kundi leygardagin forðað børnunum og teimum vaksnu í at fara í føðingardag hjá sparikassamaskottinum Bassa**

FØÐINGARDAGUR
*Orð/mynd: Snorri Brend*

**Tórsvøllur:** Tað var vetrarveður á Tórsvølli seinnapartin leygardagin, tá Føroya Sparikassi hevði boðið til hátíðarhald í samband við føðingardagin hjá Bassa.

Hundraðtals børn og vaksin høvdu leitað sær higar, hóast bæði vind og kavaæl. At tey gjørdu tað, mundi fyrst og fremst vera tí at allir aktørarnir í sambandi við Trøllapætur og Ommuna vóru til staðar og sangbólkurin Popkorn.

Her fingu tey so enn einaferð at síggja politistar, mafiuna, handilsmannin og Ommuna og ommusonin á palli samstundis, áðrenn Popkorn rundaði tiltakið av við einum nýggjum sangi til føðingardagsbarnið og aðrar av teirra kendu sangum.

Tiltakið byrjaði kl. 15 og vardi í góðan hálvan annan tíma. Møguleiki var eisini at bowla og fiska saman við Bassa.

# Kirkjugarðurin fær ábøtur

**Tað hevur leingi verið greitt at 200 ára gamli kirkjugarðurin í Havn trongdi bæði til ábøtur og endurnýggjan. Nú verður farið undir hetta arbeiðið**

ÁBØTUR
*Snorri Brend*

**Havn:** Tey sum ferðast fram við kirkjugarðinum á Svínaryggi gerast skjótt greið yvir, at neyðugt er við ábøtum.

Millum kravdu ábøturnar er neyðugt at leiða burtur vatnið í niðasta parti av kirkjugarðinum, og at umvæla bæði gøturnar, rimaverkið og portrini. Ein partur av trupulleikanum er helst hann, at kloakkrørini, sum liggja í garðinum, eru brotin.


*Myndin er tikin í januar í ár man best vísa, hvussu stórur tørvurin er á ábøtum á gamla kirkjugarðin í Havn*

Hetta hevur umsitingin í Tórshavnar kommunu arbeitt við í eina tíð, og nú er líkt til at okkurt fer at henda á hesum økinum.

Eitt yvirlit yvir hesar ábøtur vísir at hetta fer at kosta um 400.000 kr. Hesa upphæddina játtaði býráðið á seinasta fundi sínum.

Nevndur varð møguleikin at leggja asfalt ella oljugrús á gøturnar í garðinum, men hetta verður kortini ikki gjørt. Mett verður nevniliga, at hetta ikki mundi hóskað seg í hesum 200 ára gamla og friðaða kirkjugarðinum.